**Býráðsfundur mánadagin 23. februar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **14/00559**<br>**Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 106c í Norðragøtu - PRG**<br>PRG-Fiskavirkið P/F hevur søkt um byggiloyvi til Kølihús norðanfyri núverandi virkið.<br><br>Tekniska umsiting mælir til at byggiloyvi verður útskrivað til bygging av kølihøll/kølibygningi á matr. nr. 106c í Norðragøtu<br><br>Vinnunevndin og byggi- og býarskipanarnevndin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku umsiting. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini. |
| 2. | **15/00052**<br>**Umsókn um byggiloyvi – reinsiverk til Sp/f H. Konoy (FMP)**<br>Málið hevur verið til viðgerðar fyrr í vinnunevndini, og á seinasta fundi tann 21. januar 2015 bleiv kunnað, um fund sum hevur verið millum umsitingina og FMP (Eirik á Húsamørk).<br><br>Sp/f H. Konoy hevur nú sent umsókn um byggiloyvi til reinsiverk, sum er ein partur av útbyggingarætlanini hjá Sp/f H. Konoy úti á Vík í Leirvík.<br><br>Tekniska umsiting mælir til at geva byggiloyvi til reinsiverk, men at byggiloyvið ikki verður útskrivað fyrrenn málið er liðugt viðgjørt við atliti til aðrar mynduleikar, m.a Umhvørvisstovan og brunakrøv<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku umsting.<br><br>Minnilutin í Byggi- og býarskipanarnevndini, Hanus Jacobsen mælir til at fylgja tilmælinum hjá Vinnunevndini. Meirlutin, Hanna Jensen og Ólavur Olsen taka støðu á býráðsfundinum. | Málið tikið av skrá.<br><br>*Jóhan Christiansen og Árni Jacobsen vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |

**Býráðsfundur mánadagin 23. februar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**3. 15/00029**

**Tilboð uppá ArcGIS skipan**

Í sambandi við framtíðar skrásetingar við atliti til kloakkleiðingar, vatnleiðingar, brandpostar, býarætlan, sniðgøtur v.m. so skipaði Umhvørvisstovan fyri skeið um ArcGIS skipanina, sum verður nógv brúkt í DK og sum er ein einføld skipan at brúka.

Fyri nøkrum árðum síðan var avtalan við MUNIN uppsøgd fyri síðani at gera avtalu við kortal.fo. Øll hava atgongd til Kortal.fo og verður henda heimasíðan nógv brúkt av øllum stovnum, fyritøkum, borgarum v.fl.

Kostnaðurin fyri nevndu skipan er 129.870,00 + mvg fyri 2015 og haldið fyri 2016 og eftirfylgjandi ár verður 91.000,00 kr. + mvg.

Eingin játtan er til ArcGIS skipanina.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at ArcGIS skipanin verður keypt, at gera hald við Korta.fo og at verandi kort og tilfar viðv. m.a.m kloakkleiðingar verða implementera í skipanina.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at játta 129.870,00 kr. + mvg í 2015 og eftirfylgjandi árshald á kr. 91.000,00 + mvg.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, men at peningurin verður funnin innan verandi játtan á tekniska økinum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini:

**4. 14/00049**

**Vatnleiðing til fjósið millum Fjarða og Effo-støðina**

Í sambandi við at festarin millum Fjarða hevur søkt um at at fáa sóttreinsað vatn til fjósið og EFFO støðin hevur søkt um at fáa sóttreinsað vatn til støðina, er innheinta tilboð uppá hetta arbeiði.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 23. februar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Tilboð uppá omanfyri nevnda arbeiði er 320.000,00 kr. + mvg.

Eingin játtan er til vatnleiðing til fjósið millum Fjarða og Effostøðina.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera arbeiði við at leggja sóttreinsa vatn til Effostøðina í Skálabotni, brandpost við Effostøðina og sóttreinsað vatn til fjósið millum Fjarða.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir somuleiðis til at geva eykajáttan til arbeiðið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

5. **15/00058**

**Umsókn um stuðul – Víkingur**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. á 400.000,00 kr. sum eru avsettar á fíggjarætlanini. Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-20 "stuðul til ítrótt" .

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Brandur Jacobsen, Ólavur Olsen, Hanus Jacobsen og Erik Lervig vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

6. **14/00522**

**Umsókn um stuðul – Losjan**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. á 40.000,00 kr. sum eru avsettar á fíggjarætlanini. Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-10 "stuðul til mentan".

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

7. **14/00541**

**Umsókn um stuðul – Báta og listasavnið**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á kr. á 70.000,00 kr. sum eru avsettar á fíggjarætlanini. Peningurin verður tikin av konto 5.24.32.510-10 "Søvn og mentanararvur".

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 23. februar 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**8.** **15/00060**
**1.viðgerð av eykajáttan – íløgur í 2014 at flyta til 2015**
Talan er um íløgur sum eru játtaðar í 2014, har arbeiðið er byrja, men ikki er liðugt, ella har avtala er gjørd um arbeiðið.

Samb. fyriliggjandi yvitliti frá umsitingini eru tað íalt 5.356.000,00 kr. sum skulu flytst frá 2014 til 2015.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti á íalt 5.356.000,00. Harumframt mælir fíggjarnevndin til at veita eykajáttan á kr. 350.000,00 vísandi til 14/00049 (mál 4).

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, umframt at játtað 200.000,00 til keyp av bilum.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________